"Sange Mod Vårdybet":

# Musikstuderendes Kammerkor úr Ålborg vitjar

KONSERTFERÐ

*Tíðindaskriv*



Musikstuderendes Kammerkor úr Ålborg hevur í døgunum 29. juni til 5. juli 2002 fleiri konsertir ymsa staðni í Føroyum. Konsertirnar eru í samstarvi við fleiri føroysk kór og saman við einum altjóða viðurkendum saxofonspælara.

Kórið er frá universitetinum í Ålborg, har teir 27 sangararnir, sum eru um 20-30 ára aldur, allir eru lesandi á deildini fyri tónlist og musikterapi. Leiðari í kórinum er hin eisini altjóða viðurkendi kórleiðarin og kórleiðara-lærarin Mogens Dahl, og undir hansara leiðslu er Musikstuderendes Kammerkor gitið fyri sín norðurlendska kórtónleik á høgum listarligum støði.

Kórið varð stovnað í 1995, og hevur í stuttu søgu síni verið við í nógvum tiltøkum. Umframt at hava sungið í danska útvarpinum fleiri ferðir, hava tey eisini verið á konsertferð í Japan, verið við á altjóða tónleikastevnuni FIMU (Festival International de Musique Universitaire) í Belfort í Fraklandi, og í 2000 vóru tey á konsertferð í Ísrael.

Í fjør eydnaðist Musikstuderendes Kammerkor at vinna fyrstaplássið á altjóða tónleikastevnuni í Kalundborg, har kór úr øllum Europa vóru við.

Við stuðuli frá m.ø. Norðurlendska Mentanargrunninum, Universitet-inum í Ålborg, Dansk Korforbund og Dansk-Føroyska Mentanargrunninum hevur borið soleiðis til at kórið hevur fýra konsertir í Føroyum, sum allar 4 eru ymiskar: Fyrsta konsertin er mánadagin 1. juli í Fuglafjarðar Kirkju kl. 20. Týsdagin 2. juli kl. 20 syngja tey í Christianskirkjuni saman við klaksvíkskórinum "Seytjan Sangarar". Mikudagin 3. juli hava tey framførslu í Vesturkirkjuni saman við Tórhavnar Kamarkórið kl. 21. Og seinasta konsertin er í Vestmanna Kirkju hósdagin 4. juli kl. 20.

Kórið fer at framføra eina ljómfagra og spennandi skrá, ið m.a. umfatar tað verkið, sum heitið á kórferðini er tikið frá "Sange mod Vårdybet". Tað er yrkingin "Eydna" eftir Christian Matras, ið hevur hetta heitið í donsku týðingini hjá Williami Heinesen, sum danska tónaskaldið Vagn Holmboe hevur gjørt lag til. Eisini fer kórið at framføra svenskar og danskar fólkavísur, tvey verk eftir Paula í Sandágerði, og motettir eftir franska tónaskaldið Maurice Duruflé, umframt mangt annað.

Konsertin í Vestmanna 4. juli verður heilt serstøk, tí har verður frumframført verkið hjá Kára Bæk: Arise, my love, my fair one. Í verkinum, sum er skrivað við stuðuli frá NOMUS, Norðurlendsku Musiknevndini í April 2002 júst til Musikstuderendes Kammerkor, kemur eisini fyri eitt spennandi samspæl við eina sopransaxofon. Hesa sopransaxofon spælir ein av heimsins bestu saxofonspælarum, Anders Paulsson, ið er svíi. Svenski saxofonspælarin fer eini at spæla nøkur soloverk og improvisera yvir tað, sum kórið annars syngur.

Eftir framførslurnar í Føroyum fer kórið víðari til Íslands, har m.a. verður konsert í Norðurlandahúsinum í Reykjavík leygardagin 6. juli. Eisini í Íslandi fer Musikstuderendes Kammerkor at hava samvirkan við ymsi íslendsk kór.

Kórið vónar at føroysku áhoyrararnir fáa eina uppliving og eitt innlit í tann norðurlendska kórstílin, sum Musikstuderendes Kammerkor frá Aalborg Universitet, hevur gjørt til sítt serkenni.

# Summarfagnaður á Ternuryggi

**Hatta var simpelthen so gott, at hatta mugu tit gera aftur! segði ein av íbúgvunum á Sambýlinum á Bóndaheygi 14, sum hevur verið við til at fyrireika Summarfagnaðin 2002**

SUMMARFAGNAÐUR

*Tíðindaskriv*

Uppi í tí hugnaliga kolonihavaumhvørvinum á Ternuryggi hava nøkur menningartarnað til arbeiði at fríðka og viðlíkahalda eitt øki. Í tíggju ár hava tey arbeitt, og er hetta í dag ein sonn perla í Havnini – ella sum borgarstjórin úttrykti seg: »Hetta er ein oasa í Havnini«!

Í hørðum arbeiðsløtum við stríði og strevi er gott at hava nakað at síggja fram til. Og arbeiðið gevur bert meining, um tað, ið eftir liggur, verður virðismett av øðrum. Hesir tankar gjørdust til eitt umfatandi mentunartiltak, har menningartarnað kundu koma saman og kundu hugna sær við sólstrálum, tónleiki og góðum mati.

Fyrireikingarnar til eina tílíka verkætlan vóru nógvar og krevjandi. Ein flokkur við pedagognæmingum var við í verkætlanini í tríggjar vikur og við teirra mongu hondum, kreativu heilum og positiva sinni gekk arbeiðið sum fótur í hosu.

### Sól og summar

Borgarstjórin í Havnini, Jan Christiansen, setti henda Summarfagnaðin við at greiða frá søguni á stykkinum. Síðani spældi M'as Blues Band, og við sínum glaða og undirhaldandi tónleiki settu tey rættuligt lív í. Angela Petersen var vertinna, og saman við klovninum Hannibal fingu tey allar smílikullurnar fram. Klaksvíkingurin Karl Martin Samuelsen helt fram við sínum góða, undirhaldandi og vælkenda tónleiki.

Ímillum tónar og smíl gingu fólk runt og prátaðu. Øll steðgaðu á við grilluna hjá sjónvarpskokkinum Guðmundi Guðmundson. Her fekst ein góður biti og hansara vældámda persónligheit bjóða eitt gott prát. Til seinast kom Pætur við Keldu, og saman við Eyðuni Nolsøe spældu teir ymiskar kendar Beatles-sangir. Øll bíðaðu tó spent eftir »Som en drøm…«, og hann sluppu Pætur og Tóra at syngja tvær ferðir, meðan fólk sungu við.



*M'as Blues band spælir og fólk njóta lívið!*

Lotið var vorðið kalt, og endin var komin á sólstrálum og undirhaldi fyri hesu ferð. Við smílandi andlitsbráðum fóru fólk heimaftur við einum upplivilsi av at hava tað gott og stuttligt saman við teimum, man kennir. Hetta var eitt tiltak fyri menningartarnað – hetta var teirra dagur! Og dagurin gjørdist eitt prógv um, at mentanin hjá teim menningartarnaðu er nakað serstakt. Skal hon ikki kámast burtur í hópinum, má hon liva, og mennast ímillum hinar!

Tórshavn býráð gav loyvi til henda ógloymandi dag, og vit kunnu vera glað fyri, at arbeiðið, sum verður gjørt hjá menningartarnaðum, verður virt frá politiskari síðu.

Sambýlið vil fegið takka teimum, ið stuðlaðu tiltakinum fíggjarliga. Tað vóru Reyni Service, Havnar Timburhandil, Føroya Lívstrygging, Føroya Banki, Munin og Javni.

Eisini vil Sambýlið takka fyri gávulutir frá Restoff's Bryggjarí, Poul Mikkelsen, MBM, Vøruhúsið á Hjalla, Miklagarður, Føroya Keypssamtøka, Jógvan Weihe, Hjálpirótin, Eli, Thomas Dam Búnýti og Skemman. Eisini eina tøkk til Brandstøðina, Akvariubúðina og Elmekk, fyri lán av útgerð. Eina serstaka tøkk hevur Sambýlið til pedagognæmingarnar, ið hjálptu til við verkætlanini og Angelu og Hannibal, Guðmundi og tónleikararnir, ið gjørdu dagin minnisríkan.

## Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu tá kæri bróður, mammu- og pápabeiggi okkara

**Oscar Jacobsen**

andaðist og fór til gravar.

Somuleiðis takk til starvsfólkið á B7 og B8 á Landssjúkrahúsinum, og ein serlig tøkk til heimahjálparnar, sum passaðu hann øll hesi seinastu árini og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Gudny, Otto, Marin og Torbjørn**



# Ingun Simonsen: Eg føli meg illa viðfarna

**– Skúlaleiðarin í Skopun føli seg svertaðan til, men hon ger púra greitt, at hon fer víðari við málinum**

SKÚLASTRÍÐ

*Áki Bertholdsen*



*– Hevði Ingun Simonsen vitað, at tað bleiv so trupult at vera skúlaleiðari í Skopun, hevði hon aldrin søkt, sigur hon*

**Skopun:** Tað er ikki sagt, at skúlastríðið í Skopun endar nú, hóast bæði skúlaleiðarin, Ingun Simonsen, og ein annar lærari, Sigurd Bærentsen, eru flutt í onnur størv.

Ingun Simonsen sigur, at hon er so skelkað yvir viðferðina, hon hevur fingið frá Mentamálaráðnum at hon ætlar sær víðari við málinum.

– Eg ætli ikki at lata hetta um meg ganga og tí fari eg víðari við málinum, sigur hon.

Hon sigur, at hon følir seg svertaða til og at hon tí ikki vil góðtaka tað, sum er hent.

Hon vil ikki fara út í æsir við, hvat hon meinar við, tí hon fer at koma við eini almennari frágreiðing tá ið høvið býðst.

Hon vil tí heldur ikki enn útgreinað, hvussu hon ætlar sær víðari við málinum.

### Kostar nógv

Fyri at loysa trupulleikarnar í skúlanum í Skopun, hevur Mentamálaráðið gjørt av at flyta báðar lærararnar, ið hava verið nevndir í sambandi við stríðið. Sigurd Bærentsen fer á Meginskúlan og skúlaleiðarin, Ingun Simonsen fer nú í Hoyvíkar Skúla, har hon verður vanligur lærari.

Mentamálastýrið sigur, at tað er eftir umbøn frá Ingun Simonsen, at hon verður flutt í Hoyvíkar Skúla. Hetta er samstundis tann loysnin, sum er í samsvari við setanarskrivini hjá teimum báðum lærarunum.

– Tað er partvís rætt. Men tað er so langt síðani, at eg søkti um at sleppa burtur úr Skopun, tí viðurskiftini her eru ótolandi. Men tað er ikki, fyrrenn nú, at eg fái tað í boði.

Hon sigur, at hóast hon nú verður vanligur lærari, varðveitir hon lønina, hon fekk sum skúlaleiðari, umframt aðrar fyrimunir.

– Men at tað skal vera í samsvari við setanarskrivið er ikki rætt, tí eftir mínum setanarskrivi, eri eg skúlaleiðari í Skopun og onki annað.

Hon vísir eisini á, at tað fer at føra stóran eykakostnað við sær fyri hana og húski hennara, at flyta til Havnar at búgva, heldur enn at búgva í Skopun.

### Brúkt sum jarnbrot

Ingun Simonsen vísir eisini aftur, at samstarvstrupulleikar í skúlanum í Skopun er nýtt fyribrigdi, sum hevur tikið seg upp eftir at hon bleiv leiðari í Skopun.

– Tað vóru stórir trupulleikar í Skopunar Skúla, tá ið eg tók við sum leiðari. Rokið, sum tá var, er akkurát tað sama, sum nú ger seg galdandi, og teimum trupulleikunum átti eg als ongan lut í.

Hon sigur, at tá ið hon tók við, mundi tað eisini vera fáir skúlar í landinum, sum vóru so aftaliga við øllum, sum skúlin í Skopun, bæði hvat útgerð og umstøðum annars viðvíkti, tí har var onki av nøkrum.

– Síðani havi eg bygt upp ein góðan skúla við teimum hentleikum, sum krevst av einum nýmótans skúla. Játtanin til skúlan var lá ímillum 2.000 krónur og 20.000 krónur um árið, men tær havi eg eisini fingið upp á 100.000 krónur um árið í fjør og 70.000 krónur í ár, umframt pengar til tól og aðra útgerð, so nú er talan um ein heilt annan skúla.

Hon heldur eisini, at hon hevur havt eitt gott samstarv við tey allarflestu foreldur og tey, sum annars hava við skúlan at gera.

Tí heldur hon, at kærurnar frá foreldrunum eru ógrundaðar og hon følir, at tey hava svertað seg til. Men hon viðgongur eisini, at hon hevur ikki havt serliga gott samstarv við skúlastýrið, sum varð valt eftir nýggju lógini.

– Nú dugi eg at síggja, at ætlanin við at seta meg sum skúlaleiðara í Skopun var helst, at landsstýrið vildi hava ein skúlaleiðara uttaneftir at brúka sum jarnbrot fyri at loysa teir trupulleikar, sum vóru á skúlanum.

Hon sigur, at embætisfólk í landsstýrinum og mentamálastýrinum ávaraðu hana um trupulleikarnar, sum vóru.

– Men samstundis lovaði mentamálastýrið mær allan stuðul, eg hevði brúk fyri. Nú má eg so ásanna, at tann stuðulin havi eg ikki fingið

– Sum leiðari mátti eg viðhvørt taka truplar avgerðir, men tað gjørdi eg í teirri trúgv, at eg hevði Mentamálstýrið við mær, tí tað høvdu tey lovað. Men tann stuðulin kom ongantíð og tí føli eg meg slepta upp á fjall.

Hon sigur, at tá ið hon varð sett, var tað ímóti skúlanevndini sum tá sat og hetta elvdi eisini til trupulleikar. Eg havi fleiri ferðir gjørt vart við trupulleikarnar, men Mentamálastýrið gjørdi onki fyri at loysa teir og tí vant alt bara meiri og meiri upp á seg.

– Mentamálastýrið hevur verið sera jánkasligt í hesum máli. Hevði málið verið loyst beinanvegin, var tað ongantíð komið so langt.

Men Ingun Simonsen vil framvegis ikki greinað út, akkurát, hvørjir trupulleikar vóru og, hvat skuldi verið gjørt.

Hon sigur kortini, at ein trupulleiki kann hava verið, at tað eru ikki øll sum megna at umstillað seg til krøvini í nýggju fólkaskúlalógini – Men tað er bara ein partur av frágreiðingini.

Ein annar partur av trupulleikanum er, at eg fekk starvið sum skúlaleiðari framum Sigurd Bærentsen og tað hevur nívt hann. Og hann hevur eftir øllum at døma ikki fingið nóg góða grundgeving fyri, hví hann ikki varð settur. Men síðani hava trupulleikarnir alsamt hópað seg upp, uttan at Mentamálaráðið megnaði at loysa teir og nú brast so ballónin.

– Hevði eg vitað, at tað fór at vera so trupult at vera skúlaleiðari í Skopun, hevði eg aldrin søkt, sigur Ingun Simonsen.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá einum øðrum parti í málinum, Sigurd Bærentsen, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Tveir lærarar í Skopun fluttir á annað starv

**Skúlatrupulleikarnir í Skopun eru nú loystir. Báðir lærararnir, sum stríðið hevur verið um, eru nú fluttir í annað starv**

SKÚLASTRÍÐ

*Áki Bertholdsen*

– Skúlastríðið í Skopun er nú endaliga loyst.

Tað boðaði Mentamálaráðið frá í einum tíðindaskrivi seinnapartin mikudagin.

Og tað kann ikki sigast annað, enn at Mentamálaráðið valdi eina salomonska loysn á trætuni.

Ráðið er nevniliga komið til ta niðurstøðu, at frægasta loysnin er at flyta báðar lærararnar, sum ósemjan hevur verið um, í annað starv.

Tað er fyrstilærarin í Skopun, Ingun Simonsen, og ein annar lærari, Sigurd Bærentsen, sum hava verið høvuðspartar í ósemjuni, tí tey bæði hava havt so stórar samstarvstrupulleikar, at skúlin hevur ikki kunnað virka.

Frammaundan hava bæði ein meiriluti av foreldrunum í Skopun og ein meiriluti av skúlastýrinum hava heitt á mentamálaráðið um at koyra fyrstalæraran úr starvi, tí tey siga, at tað er ikki bara við Sigurd Bærentsen, at Ingun Simonsen hevur havt samstarvstrupulleikar, men eisini við foreldur.

Men nú hevur Mentamálaráðið gjørt bart og hevur flutt báðar lærararnar í annað starv.

Eftir umbøn frá fyrstalæraranum, Ingun Simonsen, verður hon flutt í Streymoyar øki 3 og hon verður nú vanligur lærari í Hoyvík.

Sigurd Bærentsen verður fluttur í Sandoyar Meginskúla, tí setanarbræv hansara fevnir eisini um Meginskúlan.

### Trygg viðurskifti

Mentamálaráðið sigur, at orsøkin til avgerðina er tann ótryggleiki, sum hevur valdað um viðurskiftini í Skopunar Skúla seinastu tíðina.

– Umráðandi er at tryggja einum fyribils settum fyrstalærara møguleikan at skapa arbeiðsfrið og samstarv við foreldur og lærarar, sigur Ráðið.

– Eisini vil Mentamálaráðið geva einum komandi umsøkjara til skúlaleiðarastarvið í Skopun bestu møguleikar at taka við starvinum.

Mentamálaráðið sigur, at tað tískil hevur valt ta bestu loysnina fyri skúlan.

At flyta báðar lærararnar er samstundis ein loysn sum gevur minsta inntrivið í starvsviðurskiftini hjá pørtunum og sum annars er í samsvari við setanartreytir teirra.



*Mentamálaráðið hevur nú gjørt bart í skopun og hevur flutt tveir lærarar í annað starv fyri at fáa frið á skúlanum*